**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

Svimjisamband Føroya bjóðar hervið til

# Føroyameistarastevnu og Juniormeistarastevnu á langgeil 2020



| | |
|---|---|
| **Dagfesting**: | 3. - 5. juli 2020 |
| **Svimjihøll**: | Páls Høll - 6 x 50m innandura svimjihylur |
| **Adressa**: | Á Oyrunum 17, FO-900 Vágur, www.palsholl.com |
| **Luttakarar**: | JM: Allir svimjarar sum hava junioraldur, tvs. gentur sum fylla ml. 14 og 17 ár í kalendaraárinum, og dreingir sum fylla ml. 15 og 18 ár í kalendaraárinum. FM: Øll sum seinastu 12 mánaðir hava klárað bronsunálatíð í minst eini grein á stuttgeil ella langgeil. Sí annars Reglugerð fyri Meistarastevnur |
| **Innboðin feløg**: | FLOT, Fuglafjarðar Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, Reysti, Suðuroyar Svimjifelag, Ægir |

**í samstarvi við**

Suðuroyar Svimjifelag

ATLANTIC AIRWAYS

### Stevnupartar - Gevið gætur at JM verður avgreitt í morgunriðlunum !

| | |
|---|---|
| 1. partur: | Fríggjamorgun 3. juli frá kl 09:30 - JM umframt FM innleiðandi riðlar |
| 2. partur: | Fríggjadag 3. juli frá kl 17:00 - FM finalur |
| 3. partur: | Leygarmorgun 4. juli frá kl 09:30 - JM umframt FM innleiðandi riðlar |
| 4. partur: | Leygardag 4. juli frá kl 17:00 - FM finalur |
| 5. partur: | Sunnumorgun 5. juli frá kl 08:30 - JM umframt FM innleiðandi riðlar |
| 6. partur: | Sunnudag 5. juli frá kl 15:00 - FM finalur |

Upphiting byrjar 1½ tíma áðrenn hvønn stevnupart

### Tekniskir fundir

Tekniskur fundur fyri dómarar er í fitness-hølinum í Páls Høll 1 tíma áðrenn hvønn stevnupart

Tekniskur fundur fyri venjarar er í fitness-hølinum í Páls Høll 1½ tíma áðrenn fyrsta stevnupart

### Kappingarskrá

| Dagur 1 | Dagur 2 | Dagur 3 |
|---|---|---|
| 1. 800m frí kvinnur*<br>2. 1500m frí menn*<br>3. 200m bringa kvinnur<br>4. 200m bringa menn<br>5. 100m firvald kvinnur<br>6. 100m firvald menn<br><br>Steðgur<br><br>7. 200m blandað kvinnur<br>8. 200m blandað menn<br>9. 50m rygg kvinnur<br>10. 50m rygg menn<br>11. 200m frí kvinnur<br>12. 200m frí menn<br><br>Steðgur<br><br>13. 4x100m blandað kvinnur<br>14. 4x100m blandað menn | 15. 400m frí kvinnur<br>16. 400m frí menn<br>17. 50m firvald kvinnur<br>18. 50m firvald menn<br>19. 100m rygg kvinnur<br>20. 100m rygg menn<br><br>Steðgur<br><br>21. 100m bringa kvinnur<br>22. 100m bringa menn<br>23. 100m frí kvinnur<br>24. 100m frí menn<br>25. 400m blandað kvinnur<br>26. 400m blandað menn<br><br>Steðgur<br><br>27. 4x200m frí kvinnur<br>28. 4x200m frí menn | 29. 1500m frí kvinnur*<br>30. 800m frí menn*<br>31. 200m firvald kvinnur<br>32. 200m firvald menn<br>33. 50m frí kvinnur<br>34. 50m frí menn<br><br>Steðgur<br><br>35. 200m rygg kvinnur<br>36. 200m rygg menn<br>37. 50m bringa kvinnur<br>38. 50m bringa menn<br><br>Steðgur<br><br>39. 4x100m frí kvinnur<br>40. 4x100m frí menn |

* Kappingarnar í 800 og 1500 frí verða avgreiddar sum beinleiðis finalur um morgunin

## JM og FM í senn og fyri seg

Hesar báðar meistarastevnur verða avgreiddar í senn í morgunriðlunum, so at Juniormeistararnir verða funnir um morgunin, umframt finalistarnir til FM seinnapartin. JM-svimjarar mugu tó sum hini hava klárað bronsunál í minst éinari grein, til at kunna luttaka í nakrari FM-finalu.

Heiðursmerkjahandanin hjá juniorum verður avgreidd um morgunin.

## Luttøkugjald

Luttøkugjaldið er kr 25 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 100 fyri hvønn start hjá liðsvimjing. Svimjifeløgini gera sjálvi upp luttøkugjøldini fyri sínar svimjarar og liðsvimjingar, og flyta samlaðu upphæddina til Svimjisamband Føroya á konto 6460 - 151.845.5 í BankNordik.

## Tilmeldingar

Tilmeldingarfíla í Grodan-sniði er send við hesi innbjóðing til øll feløg. Tilmeldingar skulu sendast í Grodan-sniði til ssf@ssf.fo í seinasta lagi 25. juni 2019, við bankakvittan fyri luttøkugjald. Ov seinar tilmeldingar verða ikki góðtiknar, og eiheldur tilmeldingar uttan gjald.

Hvør einstakur svimjari kann í mesta lagi luttaka í 12 einstaklingakappingum, umframt í liðsvimjing. JM-svimjarar gjalda bara ta éinu ferð fyri tilmelding í hvørjari grein til JM og møguligt FM, t.d. bara 25 kr fyri 50 frí.

## Frámeldingar

Avmeldingar uttan læknaváttan útloysa bót á kr 200.
Væntandi uppmøting til start útloysir bót á kr 500.

## Dómarar

HS, SuSvim og Ægir eiga at møta við fimm dómarum til hvønn stevnupart.
FLOT, FS og Reysti eiga at møta við tveimum dómarum til hvønn stevnupart.
Hesir dómarar skulu fráboðast við telduposti til ssf@ssf.fo í seinasta lagi hin 25. juni 2019.

ATLANTIC AIRWAYS

## Stjórn á stevnuni

Kappingarleiðari er Rókur í Jákupsstovu.

Yvirdómari er Rúni Gaardbo og startari Eyðun Húsgarð.

Møguligar klagur skulu stílast til svimjinevnd SSF, við gjald á kr 700.

## Corona-tilmæli

SSF ger í samráð við corona-ráðgevingina og onnur eitt corona-tilmæli at yvirhalda ísv. hesa stevnu.

Hetta tilmæli verður sent feløgunum í seinasta lagi hin 18. juni 2020.

Almennu tilmælini verða sjálvsagt eisini vird, sum lýst á www.corona.fo

## Beinleiðis úrslit og stroyming

Øll úrslit frá FM á langgeil verða at síggja beinleiðis á www.livetiming.se

Ætlanin er eisini at stroyma frá FM á langgeil á YouTube-rásini hjá SSF

## Hugnaløta

Svimjisamband Føroya bjóðar dómarum og hjálparfólkum til smyrjibreyð og drekka í Páls Høll, leygarkvøldið aftaná finalurnar.

## Samband

Spurningar og viðmerkingar kunnu stílast til ssf@ssf.fo

ATLANTIC AIRWAYS